## Jarðskjálvti við Los Angeles

Ein jarðskjálvti var í nátt nærhendis amerikanska stórbýnum Los Angeles. Amerikanski jarðfrøðistovnurin sigur, at skjálvtin var í einum øki í ein landssynning úr sjálvum býnum, og at hann var 5,0 á Richterstiganum. Miðdepilin á skjálvtanum var einar 13 kilometrar undir jørð einar 15 kilometrar í landssynning úr Los Angeles. Ein talsmaður hjá sløkkiliðnum í Los Angeles segði í morgun, at har høvdu tey ikki fingið nakrar fráboðanir um skaða av jarðskjálvtanum.



## Øll kommunistatekin burtur

Forsetin í Ukraina, Viktor Justjenko, samanbar í gjár kommunismuna við fasismuna og segði, at øll minni um sovjettíðina í Ukraina skulu beinast burtur. Orð forsetans fullu á einum minningarhaldi til minnis um fólk í tíggjutúsundatali, sum loyniliga løgreglan hjá Stalin-stýrinum myrdi í árunum frá 1937 til 1941, og sum vórðu jarðað í einum skógi nærhendis ukrainska høvuðsstaðnum Kiev. Ukrainski forsetin segði, at ukrainar hava onga orsøk til at varðveita minnismerkir frá sovjettíðini, og hann upplýsti, at tað seinasta árið hava ukrainskir myndugleikarnir beint umleið 400 ymisk minnismerki frá sovjettíðini burtur.

# kvalitetur



### Kaku í morgin

Hóast fólk ikki fara so djúpt í lummarnar í løtuni, og tað er sera freistandi hjá fyritøkum at broyta samleika, so tær kappast um prís, so helda Knutsenhjúnini, at tað er tað ringasta ein fyritøka kann gera í hesum tíðum.

– Broytir tú eina fyritøku, har kvalitetur er vørumerki, til eina fyritøku, sum bara kappast um prís, so missir tú kundarnar tú hevði, og tá prísur ikki longur er størsti spurningurin, so er sera torført at fáa samleikan upp á pláss aftur, greiddi Anders Knutsen frá.

Tey bæði Knutsen meta somuleiðis, at tað í sera fáum fyritøkum verður soleiðis, at tær doyggja í hungri í dag, fyri at sleppa at eta kaku í morgin.

– Tað er lítil møguleiki fyri, at fyritøkur, sum fokusera upp á kvalitet fara av knóranum. Tað er helst bara í støðum sum Íslandi, at kreppan veruliga er hørð, og har kann tað geva trupulleikar, men í øllum øðrum búskapum síggja vit, at kreppan er um at venda, og rokni eg ikki við, at tær fyritøkurnar fara av knóranum, men vit síggja heldur, at fólk veruliga fara at venda sær ímóti kvalitetinum, og tí vinnur kvaliteturin hjá øllum teimum, ið hava spart eitt sindur upp í góðu tíðunum, sigur Helle Knutsen.

So sambært hesum báðum, so verður kaka á skránni hjá teimum, ið velja kvalitet fram um nakrar turrar breyðmolar í dag.



*Flestu topparnir í føroyskum vinnulívi vóru savnaðir fríggjadagin, og boðini frá Helle og Anders Knutsen vóru greið. Koyri fleiri kvinnur á kantórini*

### Ruskdungarnir minka

Sambært Knutsenhjúnunum er tað eisini soleiðis, at í løtuni gerast ruskdungarnir í heiminum alsamt minni, tí fólk blaka ikki nógv lutir burtur, sum tey kunnu nýta í framtíðini. Hetta er íkomið av kreppuni, men tey bæði rokna við, at hetta er ein vani, sum fer at hanga við.

– Blaka burtur mentanin er um at detta burtur, og tí rokna vit við, at keypimentanin veruliga fer at broytast, á tann hátt, at fólk velja sær lutir, sum veruliga halda í nógv ár, heldur enn okkurt, sum tey keypa fyri at blaka burtur. Vit síggja eisini, at fólk eta upp, og hetta fer eisini at hanga við, tí fleiri og fleiri ung keypa mat, sum er vistfrøðiligur og borgar fyri góðsku. Tó keypa tey heldur minni av honum, segði Anders Knutsen í Norðurlandahúsinum fríggjadagin.

### Bodyshop brúkar blíðskap

Men sambært fyrrverandi Bang og Olufsen fólkunum verður tað ikki bara kvalitetur, sum verður avgerandi í framtíðini. Tað verður eisini kundarøkt, sum fer at hava nakað at siga.

– Eg veit, at tá tú selir, so skalt tú hava fólk, sum duga at fáa kundarnar at kenna seg vælkomnar, eg veit ikki, hvussu tey hava gjørt tað, men Bodyshop er skúladømið, um hvussu mann skal gera. Tey hava veruliga megnað at fáa fólk, sum fáa kundarnar at kenna seg væl, og syrgja fyri, at kundarnir vilja koma aftur at keypa frá sær, greiddi Helle Knutsen frá.

Hon legði síðan afturat, at hetta er nakað allar fyritøkur burdu nýtt, tí hetta kostar ikki so nógv, og kann fáa kvinnurnar, sum gera tað mesta av innkeypunum at nýta meiri pening og vera meiri trúgvar ímóti eini fyritøkur.

### Koyrið kvinnur á kantórini

Í Norðurlandahúsinum vóru flestu topparnir í Føroyum, og tað var ikki av gáloysni, at leiðslurnar vórðu nevndir slipsanálir, tí allarflestu í leiðslunum í stórur fyritøkunum í Føroyum eru menn. Hetta er sambært teimum báðum Knutsen, ikki ein gongd leið.

– Vit fara natúrliga at síggja fleiri kvinnur í leiðslu. Eg trúgvi ikki uppá kvoteringar, men fyritøkurnar burdu vitað, at konufólk gera fýra út av fimm keypum, ið verða gjørd, og at konufólk ofta duga betri at selja til konufólk. Tí burdu leiðslurnar vitað, at tað veruliga loysir seg, at hava konufólk við í leiðslunum, tí allar fyritøkur selja okkurt, og tað er øgiliga sannlíkt, at ein kvinna er keypari, heldur Helle Knutsen.

### Fittir føroyingar

Sambært teimum báðum Knutsen, er tað øllum hesum kvalitetum, tey hava møtt í Føroyum, og eftir fyrilesturin var onkur, sum undraðist, hví føroyingar ikki megnaðu betri at selja síni produktir, sum sambært føroyskum vinnulívsfólkum er kvalitetur úr enda í annan.

– Tað er ein spurningur um marknaðarførslu. Um tað veruliga er soleiðis, at tit hava produktini við bestu góðskuni, so er okkurt galið við marknaðarførsluni, tí alt, vit hava møtt, hevur verið øgiliga gott, segði Helle Knutsen.

Sostatt eru boðini frá tveimum donskum vinnulívsfólkum til føroyskt vinnulív at fáa fleiri kvinnur í leiðslu, at fokusera upp á kvalitet, ikki bara upp á prís og síðani at greiða øllum heiminum frá, hvussu tingini hanga saman.

### FAKTA

Nøvnini á fundinum vóru Helle og Anders Knutsen, Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, og Jens Ladegaard, stjóri í Ladegaard A/S, sum arbeiðir við marknaðarføring.
Helle Knutsen var kunningarráðgevi hjá B&O, áðrenn hon giftist við Anders Knutsen, sum var stjóri í B&O frá 1991 til 2001.
Síðan Helle Knutsen gavst hjá B&O hevur hon skrivað bøkur, umframt at halda fyrilestrar.
Anders Knutsen hevur, síðan hann gavst hjá Bang og Olufsen, havt nevndarsessir í nógvum ymiskum fyritøkum, umframt at skriva bøkur.